# Viðtøkur
# fyri
# Eftirlønargrunn Føroya Arbeiðarafelags
**(FA-eftirlønargrunnurin)**

## § 1

## Navn og heimstaður

Navn grunsins er "Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags" (hjánavn: FA-Eftirlønargrunnurin). Heimstaður grunsins er Tórshavn

## § 2

## Endamál

**Stk. 1.** Endamál grunsins er at reka eftirlønarvirksemi. Endamálið við hesum virksemi er at veita limunum elliseftirløn. Við eftirlønaraldur sambært galdandi lóggávu fyri ávikavist inngjald eftir verandi eftirlønarlóg og inngjøld sambært rentutryggingarlógini

**Stk. 2.** Rættindi og skyldur limanna eru ásett í einari av nevndini samtyktari eftirlønarreglugerð.

## § 3

## Limir

**Stk. 1.** Sum limir í eftirlønargrunninum gerast:

a. Lønmóttakarar, sum hava rætt og skyldu til limaskap sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og ávikavist Føroya Arbeiðsgevarafelag og Fíggjarmálaráðið.

b. Aðrir lønmóttakarar, hvørs vegna eftirlønargjøld skulu gjaldast grunninum eftir ásetingum í sáttmálum ella avtalum, sum hava líknandi ásetingar sum frammanfyri nevndu sáttmálar. Upptøka av nýggjum limabólkum skal ikki umsitingarliga ella fíggjarliga tyngja upprunaliga limaskaran.

**Stk. 2.** Undantøk frá frammanfyri nevndu ásetingum kunnu gerast fyri ávísar bólkar eftir almennum treytum, sum ikki geva høvi til spekulatión móti eftirlønargrunninum. Slíkar treytir verða gjørdar av nevnd grunsins.

**Stk. 3.** Upptøkan av limum fer fram sambært ásetingunum í eftirlønarreglugerðini

**Stk. 4.** Limaskapurin verður varðveittur við eftirlønaraldur, við hvílandi limaskapi, og við gjalding fyri egna rokning.

**Stk. 5.** Limirnir í grunninum hefta ikki persónliga fyri skyldum grunsins.

§ 4

**Skattareglur**

**Stk. 1.** Øll eftirlønargjøld v.m. og allar veitingar til limir grunsins skulu verða fevndar av reglunum um eftirlønarskipanir. Sambært galdandi lóggávu fyri ávikavist inngjald eftir verandi eftirlønarlóg og inngjøld sambært rentutryggingarlógini.

§ 5

**Ársaðalfundur**

**Stk. 1.** Aðalfundur grunsins, sum myndaður verður av umboðum fyri limirnar, hevur hægsta vald í øllum viðurskiftum grunsins. Limir grunsins eru á aðalfundum umboðaðir av teimum persónum, sum limafeløgini í Føroya Arbeiðarafelag og møguligum øðrum fakfeløgum, hvørs limir eru við í grunninum, lata seg umboða av á aðalfundi grunsins umframt at møguligir limir sum ikki eru limir í einum

av limafeløgunum hava rætt at møta á aðalfundinum. Hvørt limafelag/fakfelag hevur 1 atkvøðu fyri hvønn aktivan skrásettan lim pr. 1. januar sama ár sum aðalfundurin verður hildin. Hvørt limafelag/fakfelag hevur tó í minsta lagi 1 atkvøðu. Um umboðini fyri eitt limafelag eru ósamd um hvussu atkvøðast skal, so verða atkvøðurnar hjá felagnum býttar lutfalsliga millum tey umboð, sum er møtt felagsins vegna.

**Stk. 2.** Ársaðalfundurin verður hildin eina ferð um árið áðrenn 1. apríl. Aðalfundurin verður hildin á heimstaðnum hjá eftirlønargrunninum í Tórshavn, um ikki annað verður ásett av aðalfundinum eftir tilmæli frá nevndini.

**Stk. 3.** Nevndin kallar inn til aðalfundin í fyrsta lagi 4 vikur frammanundan og í minsta lagi við 14 daga freist við almennari lýsing og við uppslag á skrivstovu grunsins.

**Stk. 4.** Lýsingin skal hava upplýsingar um dagsskrá og nærri lýsing av teimum mest týðandi pørtum av møguligum uppskotum til viðtøkubroytingar.

**Stk. 5.** Á dagsskránni fyri ársaðalfundin skulu vera:

- 1) val av fundarstjóra
- 2) frágreiðing frá nevndini um farna ár
- 3) framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar
- 4) val av nevnd
- 5) val av grannskoðara
- 6) innkomin uppskot
- 7) ymiskt

**Stk. 6.** Allir limir grunsins hava rætt at fáa uppskot viðgjørt á aðalfundi smb. 6. petti í dagsskránni, um limurin til nevndina skrivliga setir fram áheitan um slíka viðgerð í seinasta lagi 3 vikur áðrenn

aðalfundurin verður hildin. Á ársaðalfundi grunsins skulu uppskot, sum eru nevndini í hendi áðrenn 1. februar sama ár, altíð takast við á dagsskránna.

§ 6

**Eykaaðalfundur**

**Stk. 1.** Eykaaðalfundur verður hildin um nevndin, ein av grannskoðarunum ella tann tryggingarkøni (aktuarur) grunsins ynskja tað, umframt tá 20 % av limum grunsins seta fram áheitan um slíkan fund til viðgerðar av evni, sum samstundis verður fráboðað.

**Stk. 2.** Nevndin kallar inn til eykaaðalfund áðrenn 4 vikur aftan á, at áheitan um fundin er komin nevndini í hendi. Um limir grunsins seta fram áheitan um eykaaðalfund, so skal nevndin kalla inn til fundin áðrenn 14 dagar.

**Stk. 3.** Lýsingin skal hava upplýsingar um dagsskrá fyri eykaaðalfundin og nærri lýsing av teimum mest týðandi pørtum av møguligum uppskotum til viðtøkubroytingar og verður skrivliga send til tann ella tey, sum hava sett fram áheitan um eykaaðalfund. Reglurnar í § 5, stk. 3 eru eisini galdandi í sambandi við eykaaðalfund.

§ 7

**Fundarstjóri og gerðabók**

**Stk. 1.** Aðalfundurin velur við vanligum meiriluta ein fundarstjóra.

**Stk. 2.** Tað sum viðgjørt verður á aðalfundi verðurført í bók, sum verður undirskrivað av fundarstjóranum.

**Stk. 3.** Í seinasta lagi 14 dagar aftan á aðalfundin skal gerðabókin ella eitt váttað avrit av bókini liggja atkomuligt fyri limir grunsins á skrivstovuni og aftan á vanliga ársaðalfundin eisini ársroknskapur grunsins.

§ 8

**Atkvøðugreiðsla**

**Stk. 1.** Bert umboðsfólkini nevnd í grein 5 hava atkvøðurætt á aðalfundinum.
Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta, við undantak av avgerðum um viðtøkubroytingar og avtøku av grunninum , smb. §§ 17 og 18.

§ 9

**Nevndin**

**Stk.1.** Í nevndini sita formaður og 4 ella 6 aðrir nevndarlimir.

Formaðurin og hinir nevndarlimirnir sita 2 ár í senn, soleiðis at nevndin í Føroya Arbeiðarafelag velur formannin og 2 ( 3 um talið er 6 nevndarlimir) aðrar nevndarlimir og aðalfundurin hjá eftirlønar- grunninum velur 2 nevndarlimir ( 3 um talið er 6 nevndarlimir).
Nevndin skipar seg við næstformanni og skrivara.

Líka ár velur nevndin í Føroya Arbeiðarafelag formannin og 1 nevndarlim (eisini um talið av nevndarlimum er 6) og aðalfundurin velur 1 nevndarlim (eisini um talið av nevndarlimum er 6).
Ólíka ár velur nevndin í Føroya Arbeiðarafelag 1 nevndarlim (2 um talið av nevndarlimum er 6) og aðalfundurin 1 nevndarlim (2 um talið av nevndarlimum er 6).

Afturval kann fara fram.

Hvørt át velja nevndin hjá Føroya Arbeiðarafelag og aðalfundurin hvør sín tiltakslim. Tiltakslimur, sum nevndin í Føroya Arbeiðarafelag hevur valt, tekur sæti í nevndini, um ein av nevndarlimunum, sum nevndin hevur valt fer úr nevndini, og tiltakslimur, sum aðalfundurin hevur valt, tekur sæti í nevndini, um ein av nevndarlimunum, sum aðalfundurin hevur valt fer úr nevndini

**Stk. 2.** Nevndarlimir skulu vera myndugir og skulu ikki vera stjórar ella starvsettir hjá grunninum.

**Stk. 4.** Nevndin er viðtøkufør tá hon er innkallað á rættan hátt og tá minst 3 nevndarlimir eru á fundi. Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum er formansins atkvøða avgerandi.

## § 10

## Arbeiði nevndarinnar

**Stk. 1.** Nevndin hevur yvirskipaðu leiðslu grunsins um hendi samsvarandi hesum lógum, eftirlønar-reglugerðini og galdandi lóggávu. Nevndin tekur avgerð um hvussu umsiting grunsins skal fara fram.

**Stk. 2.** Nevndin skal síggja til, at bókingar og ognarumsiting grunsins fara fram og at nøktandi eftirlit er við hesum virksemi.

**Stk. 3.** Nevndin ger í nevndarskipan nærri reglur um arbeiði nevndarinnar.

**Stk. 4.** Nevndin setir til at hava dagligu leiðsluna eina stjóra, sum saman við nevndini skal síggja til, at virksemi hjá eftirlønargrunninum er til mest møguligt gagn fyri limirnar. Nevndin setir harumframt ein aktuar, sum Tryggingareftirlitið skal góðkenna, smb. § 38, stk. 2 í lóg um tryggingarvirksemi.

**Stk. 5.** Nevndarformaðurin skal síggja til, at nevndin hevur fund, tá hetta er neyðugt. Einhvør nevndarlimur, ein av aðalfundinum valdur grannskoðari, stjórin ella aktuarurin kann krevja, at nevndin verður innkallað til fundar. Stjórin, grannskoðararnir og tann tryggingarkøni (aktuarurin) hava, sjálvt um teir ikki kunnu vera nevndarlimir, rætt at vera við og taka orðið á nevndarfundi, um ikki nevndin í serligum førum hevur tikið aðra avgerð.

**Stk. 6.** Tað sum viðgjørt verður á nevndarfundi verður førd gerðabók, sum verður undirskrivað av øllum nevndarlimum sum eru møttir á fundi. Nevndarlimir, grannskoðarar, stjórin ella aktuarurin, sum ikki er samdir/samdur við avgerð nevndarinnar, hava rætt at fáa teirra/sína støðu felda á blað í gerðabókini.

§ 11

**Arbeiði stjórans**

**Stk. 1.** Stjórin, sum skal vera myndugur og hava bústað í Føroyum, hevur dagligu leiðslu grunsins um hendi. Stjórin skal fylgja teimum stevnumiðum og ávísingum, sum nevndin ger.

**Stk. 2.** Stjórin skal síggja til, at bókingar grunsins fara fram sambært lógarinnar reglum, og at ognarumsitingin fer fram á fulltryggan hátt.

**Stk. 3.** Tiltøk, sum eftir grunsins viðurskiftum er óvanlig ella kunnu koma at hava stóra ávirkan á grunnin, kann stjórin bert seta í verk eftir serligari góðkenning frá nevndini, um ikki grunsins virksemi kemur at hava stóran ampa av at bíða eftir avgerð nevndarinnar. Í tílíkum førum skal nevndin skjótast til ber hava fráboðan um tiknu avgerð stjórans.

§ 12

**Tekningarreglur**

**Stk. 1.** Grunnurin verður bundin við undirskrift av allari nevndini ella av nevndarformanninum saman við stjóranum.

§ 13

**Ársroknskapur og grannskoðan**

**Stk. 1.** Roknskaparár grunsins er kalendaraárið. Ársroknskapurin, sum fevnir um javna, úrslitauppgerð og frágreiðing, verður settur upp sambært ásetingarnar í galdandi lóggávu.

**Stk. 2.** Ársroknskapurin skal skrivast undir av nevndini og stjóranum umframt við átekning av grannskoðarunum. Aftaná at ársroknskapurin er góðkendur á aðalfundi skal hann almannakunngerast.

**Stk. 3.** Roknskapur grunsins verður grannskoðaður av grannskoðara grunsins.

§ 14

**Eftirlønargrunsins ognir og umsiting av ognunum**

**Stk. 1.** Inntøkur grunsins fevna um eftirlønargjøld, rentur, vinningsbýti v.m. av innskoti og gávur frá limum ella øðrum.
**Stk. 2.** Fæ grunsins kunnu ikki nýtast til annað endamál enn tað sum nevnt er í viðtøkunum og eftirlønarreglugerðini. Fæið skal umsitast við tí endamáli, at fáa mest møguligan vinning, nøktandi

trygd og varðveiting av realvirði tess. Tá støða skal takast til hvussu fæ grunsins skal umsitast skulu bert takast saklig handilslig atlit.

**Stk. 3.** Fæ til eftirlønaravsetanir verður umsitið sambært reglunum í galdandi lóggávu.

§ 15

**Eftirlønargrunsins grundfæ**

**Stk. 1.**
Eftirlønargrunsins grundfæ fevnir um innskotspening og limakonti. Eftirlønarinngjøldini verða rindaði á persónliga eftirlønarkonto hjá hvørjum einstøkum limi. Av hvørjari persónligari eftirlønarkonto verður í mesta lagi 5 % sett av til limakonti.

Innistandandi á limakonti verður roknað við í basiskapital grunsins, men er annars javnsett við uppsparingina á eftirlønarkonti, bæði viðvíkjandi viðgerð av vinningi og tapi og í sambandi við útgjald av eftirløn til limir grunsins.

**Stk. 2.** Innskotspeningurin kann bert lækkast við loyvi frá Tryggingareftirlitinum.

**Stk. 3.** Upphæddir sum standa á limakonti eru partur av kapitalgrundarlag grunsins.
Fyri hetta fæ er galdandi:

a) Upphæddirnar skulu, í sambandi við at eftirlønargrunnurin fer í likvidatión ella konkurs, ikki kunna gjaldast aftur áðrenn øll onnur skuld hjá grunninum er goldin,
b) Upphæddirnar skulu í øðrum førum bert kunna gjaldast aftur, um grundfæið ikki í hesum sambandi verður lækkað til eina upphædd, sum er lægri enn gjaldførisbreddin.
*c)* Afturgjalding kann fara fram í sambandi við limauppathald um galdandi lóggáva loyvir hesum. Treytirnar verða ásettar í eftirlønarreglugerðini.

§ 16

**Rættargrundarlag og kærumøguleiki**

**Stk. 1.** Fyri tryggingaravtaluna er galdandi føroyska lóggáva á økinum.

**Stk. 2.** Klaguábyrgdari grunsins tekur sær av klagum frá limunum.

**Stk. 3.** Avgerðin hjá klaguábyrgdaranum forðar ikki pørtunum fyri at leggja málið fyri vanligu dómstólarnar.

§ 17

**Viðtøkubroytingar**

**Stk. 1.** Avgerð um broyting av viðtøkunum verður tikin á aðalfundi. Avgerðin er bert gyldug, um so er at í minsta lagi 2/3 av greiddum atkvøðum eru fyri.

**Stk. 2.** Slíkar viðtøkubroytingar skulu harumframt fráboðast føroysku skrásetingarmyndugleikunum áðrenn 14 dagar aftan á, at broytingin er samtykt á aðalfundi.

## § 18

## Avtøka av eftirlønargrunninum

**Stk. 1.** Avgerð um avtøku av eftirlønargrunninum uttan likvidatión við at samlaðu ogn og skuld grunsins verður latin til annan eftirlønargrunn ella tryggingarfelag, kann fara fram við aðalfundarsamtykt, um so er at 2/3 av teimum sum hava atkvøðurætt í grunninum atkvøða fyri uppskotinum.

**Stk. 2.** Avtøka av grunninum annars kann ikki fara fram uttan samtykki frá hvørjum einstøkum limi, um ikki samlaðu ognir grunsins frammanundan eru latnar til annan eftirlønargrunn ella tryggingarfelag ella grunsins ognir er tiknar undir umsiting smb. Lóg um tryggingarvirksemi.

## § 19

## Gildiskoma

**Stk. 1.** Hesar viðtøkur eru samtyktar á stovnandi aðalfundi tann 16.01.03 og eru galdandi frá 1. januar 2003

Broytt á aðalfundi 25.03.2009
Broytt á aðalfundi 24.03.2011
Broytt á eykaaðalfundi 12.01.2013
Broytt á eykaaðalfundi 15.11.2014
Broytt á aðalfundi 14.02.2015
Broytt á ársaðalfundi 09.02.2018

Nevndin

Georg F. Hansen
formaður

Páll Nielsen
næstformaður

Sunrid Vang

Jan Otto S. Holm

Hans Jacob Joensen